# Brasilia eitt satt formel 1 land



*Ayrton Senna er seinasti brasiliumaður, ið hevur vunnið á heimabreytini, her á sigurskamlinum aftan á sigurin í 1993*

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Formel 1 koyringarnar í Evropa hetta kappingarárið eru av, og liðini eru farin til Suður Amerika, Interlagos breytin liggur í Sao Paolo í einum av formel 1 ørastu londunum í heiminum, Brasilia. Hetta er landið, ið hevur fostrað so stórar formel 1 hetjur sum Emereson Fittipaldi, Nelson Piquet og kanska tann størsta nakrantíð Ayrton Senna.

### 5 vinnarar

Ikki færri enn 27 koyrarar hava verið úr Brasilia síðan formel 1 byrjaði í 1950. Teir hava samanlagt byrjað 570 koyringar, 88 av teimum hevur ein brasiliumaður vunnið. Senna vann 41 ferðir, áðrenn hann lat lív í formel 1 koyringini á Imola í 1994, Piquet vann 23 ferðir, Fittipaldi vann 14 ferðir og Carlos Pace vann 1 ferð áðrenn hann lat lív í eini flogvannlukku uttan fyri Sao Paolo. Umframt hesar fyrrverandi formel 1 koyrarar hevur Rubens Barrichello vunnið 9 koyringar.

Munurin á Barrichello og hinum fýra er, at Barrichello ongantíð hevur vunnið á heimabreytini. Hóast hann hevur koyrt á breytini síðan 1993, og við sínum 211 formel 1 koyringum, er tann brasiliumaðurin, ið hevur koyrt formel 1 longst, so er hann bert einaferð komin mál á heimabreytini, tað var í fjør. Hann endaði tá á einum 3. plássi, hetta hóast hann byrjaði fremstur og var skjótastur alt vikuskiftið. Tá sunnudagurin kom megnaði hann ikki at avbjóða Juan Pablo Montoya, ið vann aftan á at tætta rasarakoyring við Kimi Räikkönen.

### 4 koyrarar

Í ár verða 4 brasiliumenn á breytini. Rubens Barrichello í Ferrari og Felipe Massa í Sauber eru fastir menn á sínum liðum. Ricardo Zonta er triðjikoyrari hjá Toyota og royndarkoyrir tí fríggjadagin. Fjóri brasiliumaðurin er Antonio Pizzonia, ið enn einaferð avloysir Nick Heidfeld í Williams-BMW.

Heidfeld hevur í nakrar vikur sitið uttanfyri aftaná eitt óhapp í eini royndarkoyring. Hesin skaði er nú lektur, men nú er hann dottin á súkklu og hevur brákað økslina. Hetta gevur Pizzonia møguleika fyri uppreisn, aftan á hann á Spa í kleyvarskapi koyrdi Juan Pablo Montoya av breytini, meðan hesin lá eitt umfar framman fyri á 2. plássi.

### Døpur útlit

12 ár eru liðin síðan ein brasilumaður vann á Interlagos seinast. Hetta var seinastu ferð, at Senna vann á heimabreytini. Útlitini fyri einum brasilskum sigri eru døpur í løtuni. Hvørki Barrichello, Pizzonia ella Massa hava vinnandi bilar, men um tað regnar kann alt henda.

Um ikki kunnu brasilumenn gleðast um, at næsta kappingarár verða 2 brasiliumenn í toppliðum, Massa fer til Ferrari og Barrichello til Ferrari. Hesi lið áttu at blandað seg í stríðið um heimsmeistaraheitið næsta kappingarár.

*Kelda: www.forix.com*

Áðrenn á Interlagos:

# Aftur regn hetta vikuskiftið

**McLaren-Mercedes vístu á Spa fyri tveimum vikum síðan, at teirra bilar eru líka sannførandi í regni sum í turrum veðri, so hóast regn verður eru teir favorittar**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Veðurtíðindini á f1.com siga, at regn er sannlíkt, tá formel 1 koyringin verður í Sao Paolo hetta vikuskiftið. Hetta kann geva eitt sindur av eyka spenningi. Men tey flestu vænta, at sunnukvøldið okkara tíð eitur yngsti formel 1 heimsmeistarin nakrantíð Fernando Alonso.



*Mest sannlíkt er, at Fernando Alonso er yngsti heimsmeistari í formel 1 nakrantíð, tá hetta vikuskiftið er av*

*Mynd: Reuters*

### Kappingin er teoretisk

Ungi spaniumaðurin er 25 stig frammanfyri finska kappingarneytan Kimi Räikkönen, og í løtuni eru einans tríggjar koyringar eftir. Mestu stig ein koyrari kann fáa í eini koyring eru 10. Um Räikkönen ikki far 5 stig fleiri enn Alonso, kunnu teir ikki enda ájavnt í stigum, og Alonso er sostatt meistari.

Møguleikin hjá Räikkönen at vinna meistaraheitið er longu teoretiskur. Fyri at tað skal eydnast, skal tað gangast sera illa hjá Alonso í øllum 3 koyringunum. Hetta er ikki sannlíkt. Hyggja vit burtur frá koyringini í USA, tá bæði allir Michelin koyrararnir valdu ikki at koyra, so eru bert tvær koyringar har Alonso ikki er endaður í stigunum. Hetta ber vitnisburð um ein sera stabilan bil og ein sera stabilan koyrara.

### Nýggjur Aeoro dynamikkur

Renault koyrararnir Fernando Alonso og Giancarlo Fisichella, kunnu tó ikki kenna seg heilt tryggar. Kappingin um meistaraheitið fyri lið er sera tøtt. Renault liggur nú einans 5 stig framman fyri McLaren-Mercedes. Munurin í hesi kapping er alsamt minkaður seinastu nøgvu koyringarnar, tí eingin ivi er um, at McLaren hava betra bilin í løtuni. Men nú svarar Renault aftur við stórum aerodynamiskum broytingum. Hetta átti at minkað um munin millum liðini, og hetta kann gerast avgerandi í kappingini um meistaraheitið fyri lið.

### Nýggj dekk til Ferrari

Dekkini hjá Bridgestone hava fingið nógvar ábreiðslur í ár, og gitingar hava verið frammi um, at dekkini hjá Bridgestone eru eitt sekund seinni pr. umfar, enn tey hjá Michelin. Hetta sigst at vera ein av høvuðsorsøkunum til ringa árið hjá Ferrari. Um hetta er so ella ikki, tað er bert gitingar. Hvussu er og ikki, so hevur Bridgestone sambært f1.com nýggj dekk við til koyringina hetta vikuskiftið.

Bridgestone liðini Jordan og Minardi kappast bert við hvørt annað, og áttu dekkini ikki at broytt nakað í hesi kapping. Tað triðja Bridgestone liðið er Ferrari, men teir hava verið so langt aftan fyri seinastu koyringarnar, at tað er ivasamt um dekkini fara at gera tann heilt stóra munin.

### Regnið kann gerast avgerandi

Juan Pablo Montoya vann á hesi breytini í fjør. Í ár kemur hann til Brasilia í besta bilinum í løtuni. Tætt við heimlandi Kolumbia er hugurin at vinna sera stórur, familja og vinir koma at hyggja. Räikkönen er í sama bili, og kravið til hansara er ein sigur. Hetta eru teir báðir mest sannlíku vinnararnir, teir vístu á vátu breytini á Spa, at McLaren er líka sannførandi í regnið sum í turrum veðri. Men óhappið hjá Montoya og Pizzonia vísti, at regnið altíð kann gerast avgerandi.

**HM fyri koyararar**

| | |
|---|---|
| 1 Fernando Alonso | 111 |
| 2 Kimi Räikkönen | 86 |
| 3 Michael Schumacher | 55 |
| 4 Juan-Pablo Montoya | 50 |
| 5 Jarno Trulli | 43 |
| 6 Giancarlo Fisichella | 41 |
| 7 Ralf Schumacher | 37 |
| 8 Rubens Barrichello | 35 |
| 9 Jenson Button | 30 |
| 10 Mark Webber | 29 |

**HM fyri lið**

| | |
|---|---|
| 1 Renault F1 | 152 |
| 2 McLaren-Mercedes | 146 |
| 3 Scuderia Ferrari | 90 |
| 4 Toyota Racing | 80 |
| 5 Williams-BMW | 59 |
| 6 BAR Honda | 31 |
| 7 Red Bull Cosworth | 27 |
| 8 Sauber Petronas | 17 |
| 9 Jordan Toyota | 12 |
| 10 Minardi Cosworth | 7 |

## FAKTA

**Um brasilsku koyringina á Interlagos**




**Umferðir:** 71
**Breytarlongd:** 4,309 km
**Skjótast umferð:** Juan Pablo Montoya í 2004 (Williams-BMW) 1 minutt 11,473 sekund
**Longdin á koyringini:** 305,909 km
Núverandi koyrarar sum hava vunnið á Interlagos: Michael Schumacher 1994 (Bennetton-Ford), 1995 (Bennetton-Renault) 2000, 2002 (Ferrari), Jaques Villeneuve 1997 (Williams-Renault) David Coulthard 2001 (McLaren-Mercedes) Giancarlo Fisichella 2002 (Jordan-Ford) Juan Pablo Montoya 2004 (Williams-BMW)

*Keldur: www.f1.com og www.forix.com*